| Nr: | Navn: | Flokkur: |
|---|---|---|
| Skúli: | | Umsjónarfólk: |

# Fólkaskúlin

# Greiðslurokning

## 8. flokkur

# 1. Handilsrokning

Marin fer til handils og keypir

2 pk. av Merrild kaffi
4 pk. av Vita margarini
2 pk. av melis
4 seyðarhøvd

a) Hvussu nógv kostaðu vørurnar til samans?

Keypti hon 4 pakkar av vaskipulvuri, fekk hon teir fyri 80 kr.

b) Hvussu stórur var avsláttturin í kr. ?

c) Hvussu nógv prosent var avsláttturin á vaskipulvurinum?

**Tilboð:**

Vita margarin pk.
12,95

Ísl. seyðarhøvd stk.
12,95

Merrild kaffi pk.
29,95

Vaskipulvur pk.
25,00

Uppvask 750 ml
7,95

Melis pk.
12,95

# 2. Vekt - rúmd - evnisnøgd

Ein jarnkubbi hevur málini, ið standa á myndini.

a) Hvussu nógvar $cm^3$ er rúmdin?

b) Hvussu nógvar $cm^2$ er yvirflatan á kubbanum?

c) Hvussu nógv vigar kubbin?




*Evnisnøgdin á jarni er 7,8 g/cm*$^3$

**Vekt**

| **Vekt = evnisnøgd · rúmd** |
|---|

Evnisnøgdin á einum evni:
Tað 1 $cm^3$ av evninum vigar í g
Tað 1 $dm^3$ av evninum vigar í kg
Tað 1 $m^3$ av evninum vigar í t

## 3. Linjur í krossskipan

Tekna í somu krossskipan linjurnar:

m: $y = 2x + 4$ og
n: $y = -x - 5$

a) Í hvørjum punkti skera linjurnar hvørja aðra?

Saman við y–ásinum mynda linjurnar ein tríkant.

b) Rokna víddina á tríkantinum.

## 4. Rúmd

Ein vatntangi hevur málini, sum standa á myndini.




1 litur = 1 $dm^3$

a) Hvussu nógvar litrar tekur tangin?

Vatntangin verður fyltur við havaslangu. Havaslangan fyllur eina spann á 25 litrar uppá 20 sek.

b) Hvussu nógvar tímar tekur tað at fylla tangan við havaslanguni?

## 5. Avsláttur og prosent

Marin sá ein dagin eina súkklu í súkkluhandlinum. Prísurin var lækkaður úr 2400 kr til í 1950 kr.

a) Hvussu nógvar krónur var súkklan bíligari nú?

b) Hvussu nógv % var súkklan bíligari (1 desimal)?

Ein mánað seinni seldi Marin súkkluna við 200 kr. í vinningi.

c) Hvussu nógv % fekk Marin í vinningi?

## 6. Líkningar

Loys líkningarnar:

a) $6(x + 2) = -48$

b) $2x + 4 = -4$

## 7. Gjaldoyra

Ein ávísan dag var kursurin á evruni(EUR) 744,21. Tað merkir, at 100 EUR kostaðu 744,21 kr.

a) Hvussu nógv kostaðu 540 EUR ?

b) Hvussu nógvar EUR hevði tú fingið fyri 3500 kr. ?